HANDILSINNBÚGV TIL SØLU
Vit hava Handilsinnbúgv til sølu fyri sera lagaligan prísp/f Valdemar Lützen
tlf. 317920 - Høgni Lützen

NIKON COOLPIX 3500
Lítið brúkt digitalt kamera, 3,2M pixel vid ladara, 64MB Compact Flash, nýtt battarí, USB2 kort lesari (4 í einum). Í sera gódum standi, virkar perfekt.2100 kr.
Tlf. 314587

NADDODDUR
Thailendskur matur leygarkvøldið 13. november kl. 19.30. Øll eru vælkomin. Tilmelding áðrenn 11. nov. á
tlf. 371827

CANON IXUS 500
Digitalt myndatól 5 megapixel 3x optiskt zoom. Fyllur sum ein cigaret pakki. Sera flott kamera. Til sølu fyri 4.500 kr.
Tlf. 269294

FRISØRHJELMUR
at heingja uppá veggin til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 504014

TIL SØLU
Nokia 8310 200 kr. Nokia 6210 200 kr. Nokia 3310 við 9 eyka cower 300 kr.
Tlf. 318428/257874

JÓLABORÐHALD
Leygarkvøldið 4. desember verður jólaborðhald í Roynhøllini.
Forrættur: Karrysúpan við rækjum.
Høvuðsrættur: Buffét við m.a. stoktum lambskjøti og fleskasteik við øllum, sum hoyrir til.
Omaná: Rísdessert.
Eftir borðhaldið er almennur dansur, har Strange Fruit spælir.
Kostnaður fyri alt tiltakið; 250 krónur. Kostnaður bara fyri dansin: 100 krónur. Tekning í seinasta lagi mikudagin 1. desember.
Royn

UM NAKAR
eigur nøkur brettir, Møllestue panel ella sokallaðan brendan við, brúkt ella óbrúkt, at selja mær. Vinarliga ring
tlf. 361167 ella 361767

TIL SØLU
H.C. lyftari til sølu, árg. 2004.
Tlf. 212322

TIL SØLU
Hvít skjótihurð 73x205 við karmi til sølu fyri 1200 kr. Dupultur radiatorur v/ termostati, h. 56, b. 61, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 317606/226298

KSR-ÁRSVEITSLA
Ársveitslan hjá KSR verður í Glæmuni 13. november kl. 19. Atgongumerki eru at fáa í handlinum hjá Hannemi.
Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag

FARTELEFON
Samsung E-700, 2 mör. gomul til sølu.
Tlf. 318522 eftir kl. 17

NICORETTE TYGGIGUMMI 4 MG.
Eg havi nakað av Nicorette tyggigummi, sum eg selji fyri hálvan prís, um tað skuldi verið ein, sum vil leggja av at brúka tubbak.
Tlf. 313196

ER TAÐ NAKAR
sum vil sleppa av við grót, so ring og vit kunnu tosa um tað.
Tlf. 423495/222154

EIN DKU-5 KÁPIL
biliga til sølu. Passar til tær flestu Nokia telefonirnar. Ring og gev eitt boð. Boð undir 350,- ongan áhuga. Nýprísur 500,- kr.
Tlf. 257141

TIL FØROYA Á JÓLUM
Eg eri blind kvinna, ið mangli ein at fylgjast við til Føroya síðst í viku 50 og til Danmarkar aftur í viku 1. Tú fært ein biligan ferðaseðil sum takk fyri hjálpina. Ring skjótast tilber
+45 28708411, Sonja

TIL SALG
Sony Discman, kun brugt en gang. 300,-
Tlf. 322120/522120

JÓLASØLAN 2004
Árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag verður í Høllini á Hálsi 27.–28. november. Opið er: leygardagin kl. 10.00–19.00 og sunnudagin kl. 14.00–19.00.
Nevndin

SAMSUNG E700 KLAPTELEFON
við innbygdari antennu og í lekrum sniðið v/ myndatóli og litskermi. Hevur 9MB dynamiskt memory. Til sølu fyri 2000,- ella hægsta boð yvir.
Tlf. 255909 aftaná kl. 15

STÓRUR MARKNAÐARDAGUR
verður í Kunoyar skúla og bygdarhúsinun leygardagin 6. nov. frá kl 14.00 til 21.00. Nógvir sølubásar, tombola, fiskibrunnur, bóltkast, loppumarknaður, kafeteria og meira…øll eru vælkomin
Tog 3 flokkur í Kunoy

GULDHALSKÆDE
til mand, 14 krt. elegant ankerkæde, 50 cm. Vægt 50,9 gr. sælges for 4.500,-
Tlf. 271827

FRÍMERKJAMAPPUR
frá 1977-1984 frá Postverk Føroya og nøkur grønlendsk frimerkir frá 1997 til sølu fyri 1500 kr. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1949/2

VIKUSKIFTISFERÐ
virði 2.607 kr. til sølu fyri 2.400 kr.
Tlf. 316097

NOKIA 6610i
Ein nýggj Nokia 6610i, bílliga til sølu. Hon hevur allar nýggjar hentleikar so sum kamera, mms og gprs. Nýprísur 2500 kr, til sølu fyri ca. 1500 kr. Áhugað ring á
telf. 22881138, e-mail nielsheilmann@stofanet.dk

103 VINNINGAR
Send ABC til 1441. At vinna fartelda, fartelefonir, 25 ks. 1 1/2 ltr. Coca Cola, døgurðarættir, 20 før. røst krov, 1 Apex ferðaseðlar. Sí meira á portalinum.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

VESTMANNA SKÚLI
Okkara klassi/ar eru ikki sum hinir klassarnir, og av somu orsøk halda vit »26 ára« jubileum. Øll tey sum vóru liðug í 1979 ella sum byrjaðu í '69 eru vælkomin at vera við til okkara »mega coola party«. Nær: síðsta vikuskifti áðrenn Ólavsoku 2005. Hvar: er ikki avgjørt enn. E-mail til: stiggjur@serforsorg.fo Tu.Was@aon.at duritа@solar.fo has@ahr.fo hl@tunnil.fo fijo@post.olivant.fo - ella ringi
tlf. 218944 / 215048 / 212558 / 226226

TIL SØLU
1 ára gamal, sera góður íslendskur riðisaðil, av merkinum JARL, til sølu fyri 8.500 kr.
Ring 219020

TIL SØLU
Spildurnýggj Sony Ericsson T610 óútpakka fyri kr. 1800,-.
ring tlf. nr 598674

FARNIR DAGAR Í MYNDUM
Nakrir árgangir av myndablaðnum Nú til sølu fyri 25 kr. pr. árg.
Tlf. 316340

EIGUR TÚ
Nokia fartelefon 3510i uttan pinkort og battarí, vinarliga ring
Tlf. 532105

TIL SØLU
5 rullur glasfilt á 25 m. rullan, í alt 750,- kr.
Tlf. 315557

TIL SØLU
Ein fartelefon, Nokia 5210, ein fartelefon, Nokia 7650 v/kamera, 1 fartelefon, Siemens eF62, næstan nýggj.
Tlf. 251946

BYRSUR TIL SØLU
Brúktar byrsur til sølu.
Tlf. 220626

LOPPUMARKNAÐUR
verður í KFUM leygardagin 6. nov.r frá kl. 10-17. Vit taka tí fegin ímóti øllum lutum og klæðum leygardagin 30. okt. frá kl. 14-19 í KFUM ella ringja á tlf. 254116.
2.a í Hoydølum

TIL SALG
Standerlamper, sølv farvet. m. læselampe til salg for 250,- kr. begge 400,-
Tlf. 322120/522120

HEILSANIR

Góði elskaði Poli
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum tann 1. nov.
Allarbestu heilsanir frá ommu, Barbaru og lítlu diddu

Góða elskaða langa
Hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum. Takk fyri alt tú gert fyri okkum. Vit elska teg.
Ynskja Tóki og Tóra Kristina

Hey Helga
Hjartaligaa tillukku við tí runda degnum í dag. Takk fyri seinast, tað var stak hugnaligt.
Heilsan vit

Hey lekra
Eitt heilt ár eldri enn í gjár! Hvør skuldi trú tí? Hjartaliga tillukku.
Heilsan gággurnar

Hey Helga
Smilandi og snøgg, her í góðum selskapi á flatlondum. Tillukku við tí runda degnum í dag. Muss og klemm.
xxx

Góði Jákup
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum. Stuttligt at síggja teg so finan.
Bestu heilsanir floksfelagarnir í 5 B á Glyvrum

Eg og foreldur míni takka hjartaliga tykkum, sum gleddu meg á fermingardegnum 28. mars 2004.
Heilsan Asger Eið Jensen, Hvalba

Góði Trygvi mamba
Hjartaliga tillukku við 6 ára føðingardegnum 28. okt. Takk fyri at tú ert so góður við meg, og tímir at spæla við meg.
Heilsan Rókur

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

Góðkent úrslit

Føroyar endaðu nr. 75 av 130 londum í talvolympiaduni. Hetta varð tólv pláss oman fyri styrkismetingina

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Við eini skoru upp á 71%, var John Rødgaard lutfalsliga besti føroyski telvarin á OL. Og samlaða heildaravrikið hjá liðnum var sanniliga eisini góðkent

Hóast avboð frá okkara sterkastu telvarum, megnaði føroyska talvlandsliðið at fáa eitt tað besta OL-úrslit nakrantíð. Metið er frá Moskva í 1994, tá liðið savnaði heili 29,5 stig inn.

Høvuðsmálið undan kappingina varð at fáa 50% skoru, tvs. 28 stig. Hetta gekk tíverri júst ikki, men 27,5 stig er sanniliga eitt góðkent úrslit.

Martin Poulsen reisti seg móti endanum av kappingini og fekk hann eitt hampiligum úrslit. Sjálvur var hann ikki heilt nøgdur, men hugsa vit um mótstøðuna hann fekk, var úrsliti á góðari leið.

Kollfirðingurin Hans Kristian Simonsen fekk í roynd og veru sítt gjøgnumbrot á Mallorka. IM-normurin sum spøkti og stigini hann skolaði inn fyri liðið, prógva virðið í 21 ára gamla føroyameistaranum frá 2002. Hans Kristian tapti bert eitt talv.

Olaf Berg, ið mannaði 3. borð, hevði tyngsta róðurin. Sjey tap á hansara fyrstu olympiadu er ikki júst ein ynskibyrjan. Sigast skal tó, at Olaf møtti sera sterka mótstøðu í seks av hansara nýggju talvum, umframt at hann seks ferðir leikti við svarta fólkinum. Sum hann sjálvur segði miðskeiðis undir OL, so var hetta einfalt ikki hansara kapping.

Mr. Olympic

Stigslúkarin á liðnum hesuferð var aftur John Rødgaard. Hetta var tann tíggjunda olympiadan hjá John. Fyrsta talvið hann telvaði fyri Føroyar var javnleikurin móti Boris Spassky í fyrsta umfarinum av OL 1984.

Fyri fyrstu ferð mannaði John eitt lægri borð enn 1-2. borð og relativt veika mótstøðan, í mun til undanfarin ár, gagnaðist honum óføra væl. Bæði hann og Hans Kristian vinna sær væl av rating og hava nú omanfyri 2300 í føroyskari rating.

Eftir síni fyrstu trý talv, hevði Eyðun Nolsøe vunnið sær tvey stig, við eitt nú at vinna á sterkum telvara við 2452 ratingstigum. Síðani kom lítil turkur, ið ikki gav honum mong stig. Hóast Eyðun sjálvur var ónøgdur, er úrslit hansara okey.

Sjálvur eri eg hampiliga nøgdur við mítt úrslit. 50% skora sigst altíð at verða gott sum føroyskur OL-telvari, men telvingin kundi tó verið meira støðug.

Venjarin, Sergey Kayumov úr Usbekistan, var okkum ein góð hjálp. Serliga tá talan var um íblástur og eftirmetingar av talvunum.

Ukraina steðgaði sigursrøðini hjá Russlandi/Sovjet, sum síðani 1978 hevur vunnið OL. Hin 36´inda talvolympiadan er av og leiðin gongur til Turin, Italia, í 2006 og síðani til Dresden, Týskland í 2008.

Einkultúrslitini

Martin Poulsen	4,0/11	(37%)
Hans Kristian Simonsen	7,5/12	(63%)
Olaf Berg	2,0/9	(22%)
John Rødgaard	8,5/12	(71%)
Eyðun Nolsøe	3,0/7	(43%)
Carl Eli N. Samuelsen	2,5/5	(50%)
Føroyar tilsamans	27,5/56	(49%)

Endaliga støðan

1 Ukraina	39,5
2 Russland	36,5
3 Armenia	36,5
4 USA	35,0
5 Ísrael	34,5
6 India	34,0
7 Kuba	33,5
8 Holland	33,0
9 Bulgaria	32,5
10 Spania	32,5
…	
28 Danmark	31,5
39 Norra	30,5
45 Svoríki	29,5
47 Ísland	29,5
49 Finnland	29,5
75 Føroyar	27,5

Talvið hesa vikuna

IM John Rodgaard (2310) — Jonathan Gluckman (2194)
36th Olympiad (5. umfar), 19.10.2004

1.Rif3 d6 2.d4 Bg4 3.c4 c6 4.Ric3 Rid7 5.e4 e5 6.Be2 Be7 7.0—0 Bxf3 8.Bxf3 Rigf6 9.Be3 a6 10.b4! exd4 11.Bxd4 c5 12.bxc5 dxc5 13.Be3 (Tykist kanska sum svartur hevur loyst allar byrjanartrupulleikar, men hvítur hevur kontrol yvir viktiga d5-puntinum) **13...Fc7 14.Rb1 Rb8 15.g3 Rie5?** (Svartur hevur ikki ráð til hendan leik. Riddarin verður skjótt rikin burtur aftur) **16.Be2 0—0 17.f4 Rfd8 18.Rid5 Rixd5 19.cxd5 Rid7 20.e5** (Hvítur hevur vinnandi fyrimun) **20...Bf8 21.d6 Fa5 22.Bc4!** (Hóttur millum annað Bxf7+ Kxf7 23.Fd5+ og kongurin verður skák og mátaður innan fáir leikir. Men leikurin hóttur ikki einans svarta kongin_) 22...g6

Stødumynd eftir 22...g6

23.Bd2! Fa3 24.Rf3! Frúgvin er fangað. Gott, einfalt og trygt telvað av Rødgaard **1—0**

Kvinnurnar

1 Kina	31,0
2 USA	28,0
3 Russland	27,5

HT-vikuskiftiskapping 29-31. oktobur

1	Arnbjørn Ó. Dalsgarð	5,0/5
2	Margar Berg	3,5
3-4	Jaspur T. Gaard	3,0
3-4	Bjørn E. Thomsen	3,0
5-8	Bardo Rios	2,0
5-8	Heiðrikkur Jacobsen	2,0
5-8	Jaspur Enghamar	2,0
5-8	Hjalti Jógvansson	2,0
9	Hálvdan Dalsgaard	1,5

KÍ nýggja fótbóltdeild

Fótbóltsdeildin hjá KÍ hevði ársfund fríggjakvøldið, og fleiri broytingar vóru í nevndini. Tríggir av nevndarlimunum góvust, og nevndin fór frá at vera ein fimmmannað nevnd til at vera manna við trimum fólkum. Formaðurin seinnu árini, Markus Tummas Jacobsen, tók ikki við afturvali, og tað gjørdu nevndarlimirnir Hans Jacob Heinesen og Dánjal Jákup Joensen heldur ikki.

Nýggja nevndin er mannað tveimum av gomlu limunum, Símun Gullaksen og Manna Høgnesen, og Jan Joensen, sum er nýggjur í nevndini. Símun Gullak-sen er nú formaður.

SÍF og MB mikudagin

Nú hevur FSF gjørt av, nær dystirnir hjá sundurlisna FSV skulu spæla

Sambært reglugerðini, sum varð gjørd, tá FS Vágar varð stovnað, skulu SÍF og MB spæla um, hvat teirra skal hava plássið hjá ovara stadda liðnum, um so er, samstarvið slitnar.

Tað gjørdi tað sum so longu í vár, og nú hevur FSF so ásett, nær dystirnir skulu leikast.

Fyrri dysturin verður mikudagin, tá SÍF hevur heimavøll, og leygar-dagin verður so dystur í Miðvági.

-jm

Vogts segði upp

Skotski landsliðsvenj-arin vildi ikki longur finna seg í lemjandi atfinningunum, sum hann hevur verið fyri

Trýstið byrjaði longu í fyrsta dystinum hjá Vogts sum venjara. Móti Føroyum á Svanga-skarði vóru skotar hepnir at fáa ein 2-2 javnleik, og so stóðu miðlarnir til reiðar.

Tað eydnaðist tó skotum at stríða seg fram til play-off dystirnar í seinastu undankapping, men hetta var kortini ikki nóg mikið, og nú inniverandi undankapp-ing á ringast hugsandi hátt, hevur trýstið verið ovurstórt.

Gitt hevur verið, at einasta orsøkin til, at skotska fótbóltssambandið ikki segði honum úr sáttmálanum var, at hetta vildi kostað ov nógv, men nú skulu teir so ikki hugsa um tann postin longur.

Spurningurin er so, hvør verður nýggjur skotskur landsliðsvenjari. Uppgávan tykist í løtuni sera ótakksom, og eftir viðferðina, sum Vogts hevur fingið, er ilt at ímynda sær ein venjara, sum av fríum huga fer í sessin.

-jm

ViasatSport verður hvørt CL-kvøld

Telavarpið boðar nú frá, at hvørt kvøld, tá Champions-League dystir eru á skránni, fer Rás1 at broytast til ViasatSport. Tað vil siga, at tað altíð verður møguleiki at fylgja fleiri dystum, tá europeiska meistarakappingin er á skránni.

Týskvøldið verður tað soleiðis dysturin millum Celtic og Shahktar Donetsk, sum verður á skíggjanum, og mikukvøldið verður dysturin millum Deportivo la Coruna og Liverpool sýndur beinleiðis.

Hartil ber sjálvandi eisini til at síggja teir dystirnar, sum verða sýndir á 3+.

-jm